# BP og Shell og SEV kanna vindorku í Vestmanna

ALTERNATIV ORKA
*Jan Müller*

Áhugin fyri øðrum orkukeldum enn termiskari orku er støðugt vaksandi um allan heim. Hetta er ikki minst orsakað av vaksandi ansi fyri tí árini, ið dálking er mett at hava á veðurlag og umhvørvi. Ein av teimum alternativu orkukeldunum, ið hevur stóran áhuga er vindorka. Tey framstig, ið seinastu árini eru gjørd innan hesa orkukeldu, hava vakt stóran ans. Langt er tó enn á mál, áðrenn vindorka verður ein týðandi og álítandi partur av orkutilfeinginum. Ein onnur varandi orkukelda er sólorka. Útbúnaðurin til hesa orkukeldu, so sum sólsellur og sólfang, eru eisini nógv ment seinastu árini.


*Umhvørvið nærhendis Vestmanna kannast fyri brúk av vindorku*

Hjarnar Djurhuus stjóri hjá BP í Føroyum sigur við Sosialin, at BP ásannaði í 1997, sum eitt hitt fyrsta oljufelagið, at neyðugt varð við tiltøkum fyri at minka um termisku dálkingina av umhvørvinum og óhepna vakstrarhúsárinið. Sum liður í arbeiðinum at minka um dálkingina frá orkuframleiðsluni, hevur felagið sett sær fyri at verða undangongufelag í sambandi við verju av umhvørvinum. Sum dømi kann nevnast, at BP setti sær sum mál at minka um útlát sítt við 10% yvir eitt 20 ára tíðarskeið frá 1990 - 2010. Við tiltøkum sum betri tøkni og nýggjum arbeiðshættum, hevur BP longu nú, 8 ár áðrenn tíðarfreistina, nátt sínum máli. BP hevur seinastu 20 árini gjørt stórar íløgur í sólorkuútbúnað, og er málið hjá felagnum næstu 5 árini at økja um hesa framleiðslu við 30%.

Eisini í Føroyum er BP við í menningini av alternativari orkuframleiðslu. Hjarnar Djurhuus sigur, at BP/Shell samtakið og SEV hava gjørt avtalu um at kanna møguleikan fyri at samskipa vindorku við verandi vatnorkuverkið hjá SEV í Vestmanna. Serstakliga verður hugsað um Mýruverkið, har hæddarmunurin millum brunnarnar er umleið 240 metrar. Málið er m.a. at kanna orku- og fíggjarligu úrslitini av eini skipan, har vindmyllur framleiða streym til pumpur, ið pumpa vatn úr tí niðara brunninum upp í tann ovara.


*Eco-Tech stovnur fyri alternativa orku í Swaffam*

Samarbeiðið millum BP/Shell samtakið og SEV er skipað soleiðis, at ein stýrisbólkur, mannaður av fólki hjá BP og SEV, er settur at hava ábyrgdina av verkætlanini. Stýrisbólkurin hevur sett ein arbeiðsbólk, mannaður við fakfólki, ið skal gera tær ymisku kanningarnar í sambandi við verkætlanina. Bretska rágevingarfyritøkan Garrad Hassan, ið er leiðandi innan vindorku, skal luttaka í verkætlanini sum ráðgevi.




Fyrsti arbeiðsfundurin millum BP/Shell og SEV var 1. oktober 2002 í suðurenska býnum Swaffam. Fundurin varð hildin á Eco-Tech, ið er stovnur fyri alternativari orku. Við stovnin stendur ein vindmylla. Tá hon varð sett upp í 1999, var hon hildin at verða tann mest framkomna vindmyllan í Stórabretlandi. E-66 vindmyllan umboðar eitt nýtt ættarlið av vindmyllum. Hesar vindmyllur hava ikki gervikassa og er arbeiðsferðin bert 10 til 22 snúningar um minuttin. Hetta ger, at tær eru ógvuliga ljóðveikar. Vindmyllan er 97 metrar høg og tvørmálið á bløðunum er 66 metrar. Vindmyllan hevur eina framleiðsluorku uppá 1,5MW, ið kann nøkta miðal steymtørvin hjá umleið 3000 fólkum í Swaffam. Vindmyllan hevur eisini minkað nógv um umhvørvisskaðiligu útlátini. Útlátið av koltvíiltu er minkað við 3000 tonsum og útlátið av svávultvíiltu við 37 tonsum árliga.



*Umboð fyri SEV, vitja vindmyllu í Bretlandi*

Stórabretland hevur ásannað týdningin av alternativu orkukeldunum og hevur tí sett sær fyri, at 20% av samlaðu orkunýtsluni í Stórabretlandi í 2020 skulu koma frá alternativum orkukeldum.

Hjarnar Djurhuus sigur, at gongst sum ætlað, verður kanningin av møguleikanum at samskipa vindorku við verandi vatnorkuverk hjá SEV í Vestmanna liðug í januar 2003. Eru fortreytirnar tá til staðar, fer SEV at umhugsa íløgur í eina tílíka skipan til frama fyri føroyska el-brúkaran og náttúruna.


*Umboð fyri BP, SEV og Garrad Hassan hittast í Bretlandi*






FAROE Law

FAROE Law provides a wide range of legal assistance to business enterprises with an emphasis on the commercial objectives of the client. Our areas of practice include:

- Banking and financing law
- Corporate and Company law
- Construction law
- Employment law
- International contracts
- IPO
- Litigation and arbitration
- Mergers and acquisitions
- Oil and Gas law
- Projects and project development
- Property transactions
- Shipbuilding and financing
- Tax law
- Turnkey projects

FAROE Law as a branch of DANIA Law Firm is part of an organisation that employs a staff of 75 persons, 30 of whom are lawyers, who practice in the Faroe Islands, Denmark, Sweden, Russia, the Baltic States and Greenland.

**Copenhagen**
Bredgade 49
Postbox 9007
1260 København K
Tel.:(+45) 33 17 99 00
Fax:(+45) 33 17 99 01
info@dania-law.dk

**Svendborg**
Det Gule Pakhus
Havnepladsen 3
5700 Svendborg
Tel.:(+45) 62 21 20 10
Fax:(+45) 62 21 75 50
info@dania-law.dk

**Russia**
Dania Law Int. ApS
M. Dmitrovka 8-2
103006 Moskva
Tel.:(+7) 095 299 43 05
Fax:(+7) 095 299 02 66
avista@df.ru

**Greenland**
Nuna Advokater
Fjeldvej 16
3900 Nuuk/Godthåb
Tel.:(+299) 32 13 70
Fax:(+299) 32 41 17
greenlaw@greennet.gl

DANIA ADVOKATER A/S · CVR-NR. 14790039 · www.dania-law.dk

SANSIR TEL 355 355

FAROE
LAW
Tinghúsvegur 14 · 4th floor
P.O.Box 1218 · FO-110 Tórshavn
Tel +298 35 99 00 · Fax +298 35 99 01
faroelaw@faroe-law.fo.
www.faroe-law.dk




**Ferðaseðlar**
Áarvegur 6
FO-110 Tórshavn
Tel +298 34 00 00
Fax +298 34 00 11
e-mail travel@ff.fo

**Flogfrakt**
Hoydalsvegur 17
FO-110 Tórshavn
Tel +298 34 00 30
Fax +298 34 00 31
e-mail cargo@ff.fo

**Flogvøllur**
Vága Floghavn
FO-380 Sørvágur
Tel +298 34 00 60
Fax +298 34 00 61
e-mail airport@ff.fo

**Hotel Vágar**
FO-380 Sørvágur
Faroe Islands
Tel +298 33 29 55
Fax +298 33 23 10
e-mail hotel@ff.fo

**Um allar leiðir**



FLOGFELAG FØROYA

www.flogfelag.fo